## Javnstøðufundur á Hafnia



Javnstøðunevndin og Demokratia skipa fyri almennum fundi á Hotel Hafnia fríggjakvøldið 7. desember kl. 19. Aslaug Gisladóttir, stjórnmálafrøðislesandi, greiðir frá altjóða gransking um, hví so fáar kvinnur eru í politikki kring heimin. Við støði í altjóða granskingini fer Aslaug at hugleiða um føroysk viðurskifti, t.d. hví kvinnur ikki fáa so nógvar atkvøður sum menn, og hvørjir mentanarligir og átrúnaðarligir faktorar kunnu virka forðandi fyri kvinnur at bjóða seg fram í politikki. Janet Johannesen greiðir frá virkseminum og royndunum hjá Kveik.

## Fiskimannafelagið raðfestir eftirløn

Fiskimannafelagið raðfestir eftirlønina fremst av øllum í samráðingum sínum við Reiðarafelagið. Sum er hava sjómenn lítla og onga eftirløn, men hetta hevur Fiskimannafelagið sett sær fyri at broyta. Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, leggur dent á, at neyðugt er at fáa eftirlønarviðurskiftini upp á pláss, so sjómenn ikki vera við skerdan lut, tá ið teir gerast pensjonistar. Í eini Gallup kanning, sum manningarfeløgini gjørdu í vár, løgdu limirnir dent á, at tey vilja hava eftirlønarviðurskiftini upp á pláss, stendur +a Samráðingarnar við Reiðarafelagið halda fram hesa vikuna.

# ningin vísir

*So spyrja tey um pingvinir og eitt glas av vatni í einum bili. So stoynbýtt! (Næmingur í 10. flokki í Vestmanna skúla)*

úr Vestmanna og grannabygdini Kvívík. Teir eru í øllum førum glaðir fyri skúlan.

Treyðugt so eru mong viðurskifti á skúlanum, sum teir kundu ynskt sær øðrvísi. Men hetta tykist ikki taka hugin hjá teimum at ganga í skúla, hvørki hetta seinasta árið í fólkaskúlanum ella í framtíðini.

Fleiri av næmingunum ætla sær undir víðari lesnað eftir summarfrítíðina komandi ár - onkur fer til Havnar at ganga í skúla, ein fer til New Zealand, ein til USA og fleiri fara - sum vituligt er - á Fiskivinnuskúlan í Vestmanna!

### Betri tilfar til undirvísingina

Hesir 25 næmingarnir hava nú gingið í skúla í skjótt 10 ár. Og tey kunnu nú gera sínar egnu metingar um, hvussu føroyski skúlin er fyri og hvussu støðið er í teirra egna skúla.

Tey duga eisini væl at peika á fleiri viðurskifti, sum kundu bøtt munandi um frálæruna í skúlanum og hækka støðið á undirvísingini. Her eru nøkur dømi:

Neyðugt er við nýggjum og tíðarhóskandi tilfari, ístaðin fyri tær gomlu og donsku skúlabøkurnar.

Tað er lítið hugaligt at hava undirvísing í t.d. lívfrøði í 10. flokki, tá tað hvørki finst nakað undirvísingartilfar á føroyskum ella donskum í lærugreinini. Lærugreinarnar alisfrøði og evnafrøði eru heldur ikki ov væl fyri við tilfari.

Lærararnir mugu fáa betri útbúgving og betri møguleikar fyri eftirútbúgving. Gott er við vikarum, men ein útlærdur lærari er betri.

Umstøðurnar á skúlanum kundu eisini verið betri. Stovan til lívfrøði er ikki serliga væl útgjørd við amboðum til undirvísingina, og vegna roynd hjá 9. flokki var øll undirvísingin í 10. flokki henda dagin flutt inn í hesa stovuna.

- Tann stóri spurningurin er eisini, hvørji fakorð vit skulu læra. Í evnafrøði høvdu vit eina danska bók í 8. flokki, men tá vit fóru í 9. flokk fingu vit eina føroyska bók.

- Tá er ikki altíð so lætt at vita, hvat hetta ymiska eitur. Man verður púra forvirraður, sigur ein av dreingjunum í flokkinum.

### Stuðul úr heiminum

Umstøðurnar á sjálvum skúlanum og tilfarið til undirvísingina er sjálvandi ein týdningarmikil partur av virkseminum í skúlanum.

Men fyri erligu næmingarnar í Vestmanna gera eisini onnur viðurskifti seg galdandi, um skúlin skal menna seg uppaftur meiri í framtíðini.

- Tað er neyðugt at vit fáa meiri undirvísing í ymiskum lærugreinum, m.a. kunningartøkni, sigur ein.

Ein annar heldur so skilagóður fyri, at næmingarnir eisini mugu fáa stuðul og hjálp úr teirra egnu heimum, um tey skulu fáa nakað burtur úr skúlatíðini.

- Ja, og lærararnir sjálvir, teir kundu gott verið eitt sindur strangari - viðhvørt!, sigur ein næmingur.

Hini nikka samtykkjandi.



*Hóast tey eru nøgd við skúlan, duga tey væl at síggja at skúlanum tørvar munandi ábøtur. T.d. er stovan í lívfrøði (hagani myndin er tikin) ikki nóg væl útgjørd*

*Mynd: Jens Kristian Van*

*Tað er lítið hugaligt at hava undirvísing í t.d. lívfrøði í 10. flokki, tá tað hvørki finst nakað undirvísingartilfar á føroyskum ella donskum í lærugreinini*

## Hava pingvinir nakað við Føroyar at gera?

Hesir 25 næmingarnir í 10. flokki vóru ikki sjálvir við í undankanningini, men hava hoyrt frá vinfólki um, hvussu kanningin gekk fyri seg og hvat spurningarnir snúðu seg um.

- Har vóru rættiliga nógvir sera løgnir spurningar, sigur ein næmingur.

- Ja, tað var okkurt um pingvinir. Eg veit so ikki, hvat tað hevur verið okkum føroyingar at gera, slær ein annar næmingur fast.

Flestu teirra hava kortini hoyrt um tann eina spurningin, hann um vatnglasið í bilinum. Spurningurin ljóðaði nøkurlunda soleiðis: Um tú heldur einum glasi í hondini í einum bili, og hann brádliga bremsar, - hvønn veg fer so vatnið?

- Eg hoyrdi frá onkrum, at tey tóku slett ikki spurningarnar so seriøst. Tey fingu jú ikki nakran karakter fyri uppgávuna allíkavæl.

- Og so spyrja tey um pingvinir og eitt glas av vatni í einum bili. So stoynbýtt!, sigur ein gentunum í flokkinum.

Eitt annað, sum gjørdi sítt til, at føroyska úrslitið kanska ikki gjørdist so gott, var at spurningarnir vóru fyri allan heimin og síðani týddir til føroyskt. Fleiri av vinfólkunum hjá næmingunum skiltu ikki rætt og slætt ikki spurningarnar.

- Tað var umsett til so grótføroyskt mál, at øll ikki skiltu, hvat spurningurin snúði seg um. Fleiri svaraðu tí bara okkurt, sigur ein annar.